# Nýtt øki á Hálsi

**Í komandi Oyggjablaði verður handilsøkið á Hálsi í Havn sett í fokus við áhugaverdum samrøðum og lýsingum. Lesið mikudagin millum annað hetta:**



Torkil: - Eg hevði aldrin ímyndað mær slíka broyting



Gunvá arbeiðir í nýggjasta handlinum



Sóleyð - frá intensivari deild til skrivstovu



Hoyvíksvegur frá rás til autostradu



Hans Jákup gjørdi veg og bygningar

# Mentan aftur í hásætið

**SUNDALAGIÐ** Á fundi í farnu viku samtykti bygdaráðið í Sunda kommunu at skipa fyri eini mentanarviku í seinnu helvt av september mánaði í ár.

Ein líknandi mentanarstevna varð hildin í august mánaði í fjør við eini fjølbroyttari skrá.

Tá varð skipað fyri tiltøkum í øllum bygdum í stóru kommununi, við kvøldsetum, marknaðardegi, framsýningum, fundum og tónleiki.

Mentanarvikan 2010 byrjaði við eini kvøldsetu í Eydnuni á Oyrarbakka og endaði við einum rørsludegi á Oyrarbakka.

Líkt er til, at fólki dámdi so væl stevnuna í fjør, og tí verður hon sett at verða í viku 38 - sum er í døgunum 19. til 25. september.

*snorri@sosialurin.fo*




*Fólk í Sundalagnum sleppa aftur til ein hóp av mentanartiltøkum í heyst*

# Nýggj nevnd í gomlum felagi

**HÚSAVÍK** Hóast ungmannafelagið Sólarris skjót hevur 68 ár á baki, er framvegis lív í tí.

Nakað herfyri varð hildin regluligur aðalfundur, og tá varð nevndarval eisini á skránni.

Í nýggju nevndini sita nú Eyðritt Dalsgaard sum er forkvinna í felagnum.

Umframt hana sita Gerda Magnussen, Mari Anna Anthoniussen, Dávur Sørensen og Janus Petersen eisini í nevndini.

Eitt tað fyrsta tiltakið hjá nývaldu nevndini var at skipa fyri veitsluni, sum varð hildin seinasta leygarkvøld.

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at Sólarris varð stovnað á kyndilsmessu, 2. februar í 1943.

Húsavíkingar hava áður spælt sjónleik í ungmannafelagshúsinum, sum eisini verður útleigað til størri bólkar, tiltøk og annað.

Inni í húsinum er bæði køkur og annað ið krevst til útleigan, størri tiltøk og felagsveitslurnar.

*snorri@sosialurin.fo*




*Sólarris í Húsavík hevur skjótt 68 ár á baki*

# Nýtt gøtunavn í Klaksvík

**ÁNIRNAR** Eftir at hava búð í samfull 26 ár á Grønabóli í Klaksvík, varð bústaðurin hjá einum húski brádliga broytt til á Ánavegnum.

Hesa broyting líkaði hesin borgarin ikki, og gjørdi tí vart við støðu sína hjá Klaksvíkar kommunu í august mánaði í fjør.

Víst varð á, at øll hesi árini hevur økið verið kallað "á Grønabóli", sum eisini er gamalt staðarnavn fyri økið.

Málið kom fyri í umsitingini í kommununi, har bæði Gøtunavnanevndin og Tekniska nevnd tóku undir við hesi broytingini. Og á seinasta fundi sínum samtykti kommunan eisini tað sama.

Seinni hevur so Umhvørvisstovan góðkent og skrásett navnið á Grønabóli.

Tað eru fimm húsanummur knýtt av vegnum.

*snorri@sosialurin.fo*




*Klaksvík hevur fingið enn eitt gøtunavn - eitt navn, sum fólk hava brúkt í áratíggjur*